Bárður á Lakjuni
Bárður á Steig Nielsen
Beinir Johannesen
Magnus Rasmussen
Steffan Klein Poulsen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 28/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul (Broyting í javning av stuðulsupphæddum)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verður § 19, stk. 6 orðað soleiðis:
   "*Stk. 6*. Javning eftir hesum ásetingum fer fram fyrstu ferð tann 1. januar 2024, og eftir hetta verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári."

Viðmerkingar
Tað er ikki rætt í hesum tíðum, har prísvøksturin er serliga høgur, at lesandi skulu vera tann einasti bólkurin, har veitingarnar ikki verða javnaðar í 2024. Umframt prísvøkstur, so fer tað eisini at merkjast hjá lesandi, at hægri oljuavgjøld verða ásett. Um tað ikki verður javnað nú, so fara lesandi at hava munandi minni pening um hendi komandi ár. Tí er neyðugt, at tað verður javnað í 2024.

Við hesi broyting verður fyrstu ferð javnað eftir tí nýggja leistinum 1. januar 2024 heldur enn at bíða til 1. januar 2025. Tað merkir, at javnað verður aftur knapt hálvt ár eftir seinastu javning av lestrarstuðlinum, sum var 1. august 2023, ístaðin fyri knapt hálvtannað ár eftir, sum tað eftir lógaruppskotinum verður.

Á Løgtingi, 5. desember 2023

Bárður á Lakjuni Bárður á Steig Nielsen Beinir Johannesen

Magnus Rasmussen Steffan Klein Poulsen